# Samsýningar og ferðaendurgjald á yrkisútbúgvingarøkinum

## Fundarsamsýning til ráðslimir:

YD rindar samsýning (satsur 1*) aftaná hvønn fundin sam¬bært tímatalinum í fundarfrágreiðingunum (undantikin er formaðurin umframt limir, sum ikki ynskja samsýning). Ferðaendurgjald verður ikki goldið.

Fundarsamsýning til arbeiðsbólkar undir ráðnum:

YD rindar samsýning (satsur 1*) og møg. ferðaendurgjald til hvønn persónin aftaná hvønn fundin sam¬bært tímatalinum í fundarfrágreiðingunum.

Fundarsamsýning til yrkisnevndalimir og serkøn til vanligar yrkisnevndafundir:

YD rindar samsýning (satsur 1*) og møg. ferðaendurgjald til hvønn persónin aftaná hvønn fundin sam¬bært tímatalinum í fundarfrágreiðingunum.

Fundarsamsýning til arbeiðsbólkar undir yrkisnevndunum til gerð av útbúgvingarkunngerðum:

YD rindar samsýning (satsur 1*) og møg. ferðaendurgjald aftaná hvønn fund sam¬bært tímatalinum í fundarfrágreiðingunum.

## Fundarsamsýning fyri gerð av lesiætlan:

YD rindar fasta samsýning (satsur 2*) fyri hvørja lesiætlan (vanliga 10-20 tímar - tó max 30 tímar) til hvønn persónin eftir framman¬undan gjørda avtalu við YD. Er talan um dagføring av lesiætlan, rindar YD eina minni fasta samsýning (max 20 tímar) til hvønn persónin eftir frammanundan gjørda avtalu við YD.

## Samsýning fyri uppgávugerð til sveina- og yrkisroyndir, herundir tilsvarandi sjúkraroyndir:

YD rindar samsýning (satsur 2*) pr. uppgávusett (vanliga 10-20 tímar - tó max 30 tímar) til hvønn persónin eftir framman¬undan gjørda avtalu við YD fyri gerð av yrkis- og sveinaroyndaruppgávum, herundir tilsvarandi sjúkraroyndaruppgávur. Sambært § 9 í



Hoydalsvegur 1
FO-100 Tórshavn
+298 30 65 60
yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo
**yrkisdepilin.fo**

Kunngerð um felags útbúgvingar¬reglur og felags útbúgvingarbygnað fyri yrkis¬útbúgvingar er ásett: at skúlarnir gera uppgávurnar til ávegis- og miðskeiðis¬royndirnar, og at Yrkisdepilin ger uppgávurnar til sveinaroyndirnar og tilnevnir metingar¬dómarar til miðskeiðis- og sveinaroyndirnar). Innan skrivstovuyrkið gera lærlingarnir royndar¬uppgávuna (uttan samsýning).

Er talan um dagføring av yrkis- og sveinaroyndaruppgávum, rindar YD eina minni fasta samsýning pr. uppgávu¬sett (max 20 tímar) til hvønn persónin eftir frammanundan gjørda avtalu við YD.

## Samsýning til metingardómarar:

YD rindar fyri døming (satsur 3*) og møg. ferðaendurgjald (ferðauppgerð er neyðug), til hvønn persónin aftaná hvørja roynd (t.e. allar sveinaroyndir, herundir tilsvarandi sjúkraroyndir, og allar miðskeiðs¬royndir) eftir uppgerð frá metingar¬dómara/-dómarum (samanber tekstin omanfyri í kunngerðini um felags útbúgvingarreglur). YD rindar harumfarmt samsýning til metingar¬dómarar, tá SIT-næmingar fara upp til endaliga verkliga roynd. Innan skrivstovuyrkið fáa metingardómarar samsýning (satsur 3*) fyri 4 tímar pr. lærling íroknað fyrireiking.

**Samsýning fyri rættlestur:**
Kr. 100 pr. bls. fyri rættlestur
Kr. 150 pr. bls. fyri málsliga viðgerð + rættlestur
Kr. 200 pr. bls. fyri týðing – lættur tekstur
Kr. 250 pr. bls. fyri týðing – tungur tekstur

**Satsir:**
1*) Fundarsamsýning (1-3 tímar, 3-5 tímar og yvir 5 tímar)
2*) Samsýningin er handverkaratímaløn + 35%
3*) Samsýningin er handverkaratímaløn + 60%